
Statoil skal leita eftir olju í Nikaragua. Mynd: Helge Hansen/Statoil

# Statoil skal leita eftir olju í nýggjum oljulandi

**Jógvan Hugo Gardar**

01.06.2015 - 07:35

Oljan.fo

Statoil hevur fingið leitiloyvir á Sandino-økinum, Kyrrahavsmegin hjá Nikaragua. Talan er um loyvir í einum øki sum er 16.000 fermetrar til støddar. Statoil gerst fyristøðufelag við einum ognarparti uppá 85 prosent, meðan statliga oljufelagið hjá Nikaragua, Empresa Nicaraguensa de Petroleo (Petronic) eigur restina av loyvinum,

Leitistjórin hjá Statoil fyri hetta øki, Nick Maden, sigur at talan er um eitt heilt nýtt øki, har at kalla eingin leiting eftir olju hevur verið higartil, men at hetta passar inn í langtíðarætlaninar hjá Statoil um at luttaka í nýggjum leitiøkjum.

Nikaragua er nýtt oljuland fyri Statoil.

- Vit fara inn í Nikaragua tíðliga í leitiarbeiðnum, og fara at taka støðu so hvørt vit fáa meir at vita frá kanningarabeðnum um hvussu skal farast víðari, sigur Statoil í einum tíðindaskrivi í morgun